Prixið er í ár skipað við fýra innleiðandi kappingum, har tveir bólkar koma víðari til eina hálvfinalu. Frá hálvfinaluni verða tríggir bólkar valdir til finaluna í Prixnum, sum verður partur av nýggja tiltakinum, Atlantic Music Event. Øll tey innleiðandi umførini verða í Fuglafirði, hálvfinalan verður á Tvøroyri og finalan í Norðurlandahúsinum í Havn.

**1. umfar, 4. feb. kl. 20.00**
Go Go Blues · Paradox
Dimmi · SIC · DejaVu
Lama Sea

**2. umfar, 12. februar**
Ph 5,5. · Side Effect
All that Rain · Makrel
Róp · MMM

**3. umfar, 26. februar**
Eyðun Nolsøe · Lawetz
ROK · Direct Level
Frostbit · The Dreams

**4. umfar, 5. mars**
Braquet
Kristleif Zachariasen
Synarchy · EGR2PLZ
Terji Rasmussen Band
onkikanndiskuterast.altkann

**Hálvfinala, 2. apríl**
Í hálvfinaluni verða tveir teir bestu bólkarnir frá hvørjum innleiðandi umfari. Burtur úr teimum átta bólkunum, skulu tríggir teir bestu veljast til finaluna.

**Finala, 23. apríl**
Finalan í Prixnum verður partur av galla-tiltakinum, sum verður kallað Atlantic Music Event. Tríggir bólkar kappast um endaliga sigurin í Prixnum. Umframt finaluna verða aðrar tónleikaframførslur eisini.

**Nýggir sangir**
Í øllum teimum innleiðandi umførunum verður spælitíðin í mesta lagi 20 minuttir og í minsta lagi 15 minuttir. Tveir triðingar av spælitíðini skulu bólkarnir spæla sangir, sum ikki eru givnir út áður.

**Ferðsamband**
Bussar koyra í sambandi við øll tey innleiðandi umførini í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Bussar koyra úr Vestmanna, Sundalagnum, Eiði, Toftum, Strondum og úr Havn. Harafturat siglir strandfaraskipið Sam úr Fuglafirði til Klaksvíkar eftir tær innleiðandi kappingarnar, um nóg stórur áhugi er fyri hesum Serlig atgongumerki til Prixið og ferðaseðil til Sam fáast á Kunningarstovuni í Klaksvík.

Á heimasíðuni hjá Prix Føroyum - www.prix.fo - eru fleiri upplýsingar um ferðasambandið.

# KVINNURNAR Á PALL

**Ph 5,5 er navnið á nýggjum bólki, har kvinnurnar eru skapandi megin, men har bólkurin annars allur er við til at leggja tónleikin tilrættis. Bólkurin er samanseting av ymsum tónleikarum við ymsari bakgrund og hetta hoyrist aftur í ymsu stílunum, ið tónleikurin umboðar**

PH 5,5
*Dagfinn Olsen,*
*dagfinn@sosialurin.fo*



Onkur kvinna hevur longu verið á palli í Prix Føroyar kappingini í ár. Men Ph virðið broytist óivað munandi, nú bólkurin Ph 5,5 kemur á pall. Kvinnurnar telja helmingin av mannigini og tá tað ræður um skapandi kreftirnar, so føra kvinnurnar pennin. Rannvá Jacobsen og Gurið Hansen skriva orð og løg.

Men manningin er í felag um at leggja tónleikin tilrættis.

Bólkurin sá dagsins ljós í desember 2004. Tær báðar høvdu hug at royna heimagjørda tilfarið og bólkurin kom nærum í av tilvild, tí tað skerst ikki burtur, at manningin er sera ymisk og hevur ymsa bakgrund og royndir.

Rannvá var við til at gera fløguna Mura og Gurið hevur óivað fingið gott í beinið, upplýsir ein av royndaru limunum í bólkinum, Heðin, við einum smíli. Hon er dóttir ein av guitarúrmælingunum í Føroyum, Hans Karl Hansen.

At Heðin Z. Davidsen og Brandur Jacobsen, tveir kendir jazzarar, komu við er tí, at teir vóru knýttir at ætlanini við fløguni Mura. Tá teir so komu uppí arbeiðið hjá Rannvá og Gurið, so hildu teir hetta vera áhugavert og stuttligt og at teir sluppu at vera við til at seta síni merki á tónleikin gjørdi, at teir hildu fram.

Av tí at bakgrund og royndir eru so ymisk, so er tónleikurin eisini úrslit av hesum. Hann er har, ið hesi fólkini hittast á tónleikavøllinum. Og tá tey hittast, so snýr tað seg m.a. um reggae, folk og kanska eisini teknokendan tónleik.

Av tí at bólkurin er sera nýggjur, so eru vónirnar ikki um at koma víðari, hóast tað sjálvandi er ein dreymur. Men limirnir meta, at ein góður mátari fyri, um bólkurin er góður ella ikki, eisini er, um bólkurin klárar at halda áfram at vera til aftan á Prix Føroyar kappingina.

# ALL THAT RAIN VIÐ NÝGGJUM SANGARA

**Rókur Jakobsen hevur verið ein av profilunum í Prix Føroyar tónleikakappingini, og hesaferð skal hann verða oddamaður í bólkinum All That Rain. Hann heldur, at tað er spennandi at ganga nýggjar leiðir**

ATR
*Eyðun Klakstein,*
*eydun@sosialurin.fo*



**Rókur Jakobsen er nýggjur sangari í All That Rain. Leygarkvøldið trína teir inn á Prix-pallin aftur**

**Mynd: Ningur**

Rókur Jakobsen kom inn á føroyska tónleikapallin sum eitt stjørnuskot í 90'unum, og í 1999 vóru hann og restin av manningini í Tangz eitt spennandi ískoyti til Prix Føroyar tónleikakappingina.

Síðani hevur Rókur Jakobsen verið við í Prixnum hvørjferð, og hann hevur samanlagt verið við trimum ymiskum bólkum. Leygarkvøldið fer hann aftur á pallin til eitt Prix-umfar. Hesaferð sum sangari í All That Rain, ið ger comeback í kappingini.

– Fyri meg er hetta nýggjur tónleikur og nýggir tónleikarar at spæla saman við, og tað er spennandi at ganga nýggjar leiðir og royna nakað nýtt, sigur Rókur Jakobsen.

Hann hevur eisini roynt seg sum solist, og herfyri vann hann singer/songwriter kappingina, sum Hafnia Lounge skipaði fyri.

## Harðari tónleikur

All That Rain er bólkur við royndum tónleikarum, og teir hava eisini fleiri ferðir roynt seg í Prix Føroyum – fyrst undir navninum Kjølar og síðani sum All That Rain.

Teir hava verið ein tann besti popprockbólkurin í Føroyum seinasta árini, men tónleikurin hjá teimum er broyttur nakað, og All That Rain anno 2005 er ikki tað sama, sum fólk hoyrdu í Prixnum fyri fýra árum síðani.

– Eg haldi, at tónleikurin er eitt sindur harðari nú, tað er ikki so popput, sum tað var. Harafturat eru eisini eg og Hans Ranvsfjall nýggir í bólkinum síðani kappingina seinast, so tað gevur eisini eitt annað ljóð, sigur Rókur Jakobsen.

## Syngja á føroyskum

Eitt annað, sum er broytt við All That Rain, er, at nú syngja teir á føroyskum. Fyrr var teirra mál enskt, og tað hoyrdist aftur í sangunum og sást aftur á heimasíðuni. Nú er alt broytt til føroyskt.

– Eg havi altíð hildið tað vera natúrligt at syngja á føroyskum, men tað er ein rímiliga breið semja í bólkinum um, at vit nú skulu syngja á føroyskum, sigur Rókur Jakobsen.

Teir kendastu sangirnir hjá All That Rain eru allir á enskum, men teir hava tó áður roynt seg á føroyskum – við innspælingini av Føgru Blómu, sum hevur verið nógv at hoyrt í útvarpi.

## Væ smurd maskina

Rókur Jakobsen kom upp í All That Rain í fjørsummar, og hann trívist væl í nýggja bólkinum.

– Tað hevur verið lætt hjá mær at komið við í eina so væl smurda maskinu, sum All That Rain er. Hinir tónleikararnir í bólkinum hava spælt saman í fleiri ár, so bólkurin hevur eina sterka grund, sigur Rókur Jakobsen.

Hann hevur sjálvur fótað sær sum sangari og yrkjari í All That Rain, meðan teir í bólkinum framvegis arbeiða tætt saman um tónleikin.